TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 30.06.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, ~~Jónleyg Jespersen Bech~~, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jónhild Midjord Nybo –*Møtti kl. 17:20 og var ikki við til viðgerðina av mál 45/22*
Mina Joensen

Ikki møtt: Jónleyg Jespersen Bech og Alvi Mortensen

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 45/22 | 22/00253-2 | Felagið Føroysk Træseglskip -Salt Sigling 8-10. juli 2022 |
| 46/22 | 22/00284-1 | IRF -útbygging av móttøkustøðini í Trøllavík við møguleika fyri felags ruskbingjuplássið í Suðuroynni |
| 47/22 | 22/00288-2 | Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -roknskapur 2021 |
| 48/22 | 22/00292-4 | Avtala um marknaumskipan millum matr.nr. 297b og litra "o" á Tvøroyri - Reidar Petersen |
| 49/22 | 22/00296-1 | Avloysara- og eykaskip hjá SSL Strandfaraskip Landsins -Havna- og tænastugjøld til Tvøroyrar havn |
| 50/22 | 22/00275-2 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2022/2023 |
| 51/22 | 22/00295-1 | |
| 52/22 | 22/00294-2 | |
| **Til kunningar** | | |
| 26/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| 27/22 | 22/00268-3 | Barnaváttanir -kunning um lógina, ið kom í gildið 1. juni 2022 og mannagongdir |

| | | |
|---|---|---|
| 28/22 | 22/00204-1 | |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin, og kunnar um at 2 býráðslimir Jónleyg Jespersen Bech og Alvi Mortensen hava fráboða at tey ikki kunna møta til fundin í dag orsakað av at tey eru stødd uttanlanda.

Jónleyg Jespersen Bech og Alvi Mortensen hava heitt á fyrsta og annan varalim á lista T «Felagslistin» at møta ístaðin. Hesar hava báðar siti í býráðnum fyrr sum varalimir
Fyrsti varalimur er: Jónhild Midjord Nybo
Annar varalimur er: Mina Joensen

Atkvøtt verður um hvørt Jónhild Midjord Nybo og Mina Joensen, sum er fyrstu og annar varalimur á lista T, Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 kunna taka sætið í býráðnum 30.06.2022.
Hetta er einmælt samtykt.

Borgarstjórin spyr um viðmerkingar eru til skránna.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon ynskir at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna umboðandi Tvøroyrar kommunu verður sett á skrá av nýggjum, har limirnir blíva valdir samb. lutfallvalháttinum.

Kristin Michelsen upplýsir, at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 3 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021, samt 3. februar 2022.

Kristin Michelsen kunnar um, at stýrið hjá Bú og Heimatænastuni í Suðuroy hevur samtykt at seta Hanus Toftheyggj í starv sum leiðara í Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy, og at Hanus Toftheyggj byrjar í starvinum 1. september í ár, samstundis sum Anna Djurhuus fer frá vegna aldur 1 oktober 2022.

**Til støðutakan**

**45/22**
**22/00253-2 Felagið Føroysk Træseglskip -Salt Sigling 8-10. juli 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 57/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 68/22 |
| 3 Býráðið | 30.06.2022 | 45/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 17.05.2022**
Felagið Føroysk Træseglskip hevur sent umsitingini umsókn um stuðul til tiltak "Salt Sigling 2022" í døgunum 8-10. juli 2022.

Fyrireikarin skrivar í umsókníni at:
*Roknað í rundum tølum fer tiltakið helst at kosta 25.000 kr, sum Felagið Føroysk Træseglskip við hesum fer at søkja Tvøroyrar kommunu um at fíggja. –Og kostnað til hjálparfólkum tónleikarar og fólk frá Tvøroyrar Kommunu (Uml. 45 fólk) boðin til døgurða bæði kvøldini fyri kr. 11.000 kr.*

*Samlaða upphæddin, sum vit sostatt søkja um stuðul til frá Tvøroyrar Kommunu, verður 25.000kr. + 11.000 kr = 36.000 kr.*

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Forkvinnan í mentanarnevndini mælir til ikki at stuðla av játtani hjá mentanarnevndini, mælt verður til stuðulin verður játtaður av umboðanar kontoini hjá Tvøroyrar kommunu. Málið var einmælt samtykt.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.
Einmælt samtykt at Sólfríð Bech samskipar vegna Tvøroyrar Kommunu

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Borgarstjórin mælir til at fylgja tilmælið hjá Mentanarnevndini, einmælt samtykt. –Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Borgarstjórin mælir til at veita stuðul á kr. 36.000,- og at stuðulin verður latin av FÆ2022 §516, 15. Vitjanir og umboðan. –Einmælt samtykt

## 46/22

## 22/00284-1 IRF -útbygging av móttøkustøðini í Trøllavík við møguleika fyri felags ruskbingjuplássið í Suðuroynni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.06.2022 | 33/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 70/22 |
| 3 Býráðið | 30.06.2022 | 46/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 10.06.2022**
IRF hevði bjóða øllum kommunum í Suðuroynni til kunandi fund í bygda skúlanum í Hovi hin 9. Juni 2022, har framløga var um ætlaninar at dagføra og útbyggja móttøkustøðina hjá IRF í Trøllavík. Henda ætlanin viðførir -umframt munandi betaran av arbeiðsumstøðunum og viðkan av móttøkuni í Trøllavík- øllum kommunum í Suðuroynni møguleika, at vísa sínum borgarum til Trøllavík heldur enn á lokalu staðsettu bingjuplássinum í hvørjari komunu sær, tá húsarhaldsrusk skal burturbeinast.

Mælt verður til at at Tvøroyrar kommuna gerðst partur av hesari ætlan beinanvegin, soleiðis at IRF tekur hædd fyri hesum ynskinum ísamband við projektering av verkætlanini.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 13. juni 2022:**
Tekniska nevnd tekur undir við, at Tvøroyrar kommuna verður ein partur av framløgdu verkætlanini, tá klárt er at taka ímóti burturkasti.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Borgarstjórin mælir til at Tvøroyrar kommuna tekur undir við verkætlanini hjá IRF, og at Tvøroyrar kommuna boðar IRF frá, at Tvøroyrar kommuna verður partur av verkætlanini, og IRF tekur hædd fyri hesum í samb. við projektering. Einmælt samtykt

Borgarstjórin mælir til at kommunala bingjuplássið í grótbrotinum í Froðba verður niðurlagt, tá verkætalanin hjá IRF í Trøllavík er liðug. Einmælt samtykt

Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá borgarstjóranum og Fíggjarnevndini

**47/22**
**22/00288-2 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -roknskapur 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 63/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 69/22 |
| 3 Býráðið | 30.06.2022 | 47/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14. juni. 2022**
Umsitingin hevur móttikið grandskoðan roknskap fyri fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn árið 2021.

Tvøroyrar kommuna hevur á Fíggjarætlan fyri ár 2022 játta stuðul á kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn, og mælt verður til at stuðul á kr. 325.000,- verður fluttur á konto hjá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn eftir umsókn.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúðin og Løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986

**Fíggjarligar avleiðingar:** Rakstrarkonti §528 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn útgreina: (Játta í alt FÆ2022 kr. 325.000,-)

**Býti av stuðulsupphædd:**
- Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-
- Lønir til starvsfólk: 175.000,-
- Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Einmælt samtykt rokniskap og at veita stuðul sambart málslýsing.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Mentanarnevndini. –Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**48/22**
**22/00292-4 Avtala um marknaumskipan millum matr.nr. 297b og litra "o" á Tvøroyri -Reidar Petersen**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 81/22 |
| 2 Býráðið | 30.06.2022 | 48/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Umsitingin hevur fingið fyrispurning um marknaumskipan millum matr.nr. 297b og litra "o" á Tvøroyri, ið er ogn hjá Reidar Petersen og Heidi Malunardóttir. Latið verður uml. 108m2 av matr.nr 297b, oman móti Sjógøtu til breiðkan av koyrivegnum, afturfyri áleggur Tvøroyrar kommuna uml. 108m2 av asfalt á matr. nr. 297b.

**Lógargrundarlag:** Kommunufultrúin og matrikkullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Einmælt samtykt. –Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Einmælt samtykt at Reidar Petersen og Heidi Malunardóttir lata uml. 108m2 av matr.nr. 297b til Tvøroyrar kommunu, afturfyri ber Tvøroyrar kommuna kostnaðin av at asfaltera uml. 108m2 av parkerings økinum hjá Reidar Petersen og Heidi Malunardóttir.

**49/22**

**22/00296-1 Avloysara- og eykaskip hjá SSL Strandfarða Skip Landsins -Havna- og tænastugjøld til Tvøroyrar havn**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 79/22 |
| 2 Býráðið | 30.06.2022 | 49/22 |

**Málslýsing: Kommunusjórin 20.06.2022**
Borgarstjórin, Kristin Michelsen ynskir at Tvøroyrar býráð viðgerð og tekur støðu til havna og tænastugjøld hjá avloysara/eykaskipum hjá SSL "Strandfarða Skip Landsins", ið sigla á Trongisvágsfjørð og avskipa farm og ferðafólk.

Borgarstjórin heldur onga orsøk vera til, at skip hjá tí almenna skulu hava sersømdir fram um onnur skip, og mælir til at avloysara- og eykaskip hjá SSL rinda havnagjald javnt við onnur skip.

Borgarstjórin vísir á, at øll skip skulu viðfarast eins, og tí heldur tað ikki vera rætt at pilka nøkur skip burtur úr, sum ikki skulu rinda havnagjald.

**Lógargrundarlag: Kommunufultrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Einmælt samtykt at avloysara- og eykaskip hjá SSL rinda havna- og øll tænastugjøld javnt við onnur farmaskip.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá borgarstjóranum og fíggjarnevndini.

**50/22**

**22/00275-2 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2022/2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 62/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | | |
| 3 Býráðið | 30.06.2022 | 50/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.05.2022**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2022/2023.

Í Umsókníni verður upplýst at tørvur er á stuðul svarandi til kr. 400.000,-
- Hølisleigu á Sjógøtu 2, ljós og hita kr. 200.000,-,
- Nýskapandi virksemið og rakstur kr. 200.000,-

Søkt verður sostatt um somu stuðuls upphædd, ið var játta fyri skúlaárið 2021/2022, har Tvøroyrar kommuna hevur samtykt við eykajáttan at lata í stuðul kr. 400.000,-.

*Tvøroyrar kommuna leigar til Føroya Eftirskúla 175,5 m² fyri kr./ár 153.562,50 umframt el og hita í postabygninginum á Sjógøtu 2. Árini 2019 til juni 2020 eru uttan leigukostnað, og latin av Tvøroyrar kommunu sum ígongdsetanar stuðul.*

**Leigugjøld fyri Sjógøtu 2:**

| Ár | Mnd. | leigugjald | Goldið | Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 2019 | 0 | 0,- | 0,- | Latið sum stuðul |
| 2020 | 6 | 89.578,00 | 0,- | Leigusáttmála avtala |
| 2021 | 12 | 153.562,50 | 0,- | Ex. el og hita |
| 2022 | 12 | 153.562,50 | 0,- | Ex. el og hita |

**Tvøroyrar kommuna hevur umframt veitt fíggjarligan stuðul til Føroya Eftirskúla:**

| Ár | Avsett á fíggjarætl. | Stuðulsumsókn FE | Útgoldið í stuðul | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|
| 2019-2020 | 150.000,- | 200.000,- | 150.000,- | 0,- |
| 2020-2021 | 500.000,- | 500.000,- | 500.000,- | 0,- |
| 2021-2022 | 0,- | 400.000,- | *200.000,- | **400.000,- |
| 2022-2023 | 200.000,- | 400.000,- | | |

**fluttar eru í jan. 2022 kr. 200tkr.*
*** ikki flutt d.d. 200tkr.(vegna eftirstøðu í leigugjald)*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.

*Kapittul 6, Fígging av rakstri og íløgum*

*§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. Írestandi fígging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*

*Stk. 2. Landskassans partur er:*

*1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latin í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*

*2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett á FÆ2022 418, Eftirskúlin kr. 200.000,-

**At taka støðu til:**

- Fíggjarligan stuðul til Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2022/2023
- Útistandandi leigugjøld fyri Sjógøtu 2

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Einmælt samtykt at umsitingin samskiftir við Føroya Eftirskúla um útistandandi áðrenn støða verður tikin til stuðul. Málið verður tikið upp á næsta fundi.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Borgarstjórin mælir til at veita stuðul til Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2022/2023 á kr. 200.000,-, ið verður fluttur av játtan FÆ2022, §418, stuðul til Eftirskúla. –Einmælt samtykt.

**51/22 LUKKA MÁL**
**22/00295-1**

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

**52/22 LUKKA MÁL**
**22/00294-2**

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

Til kunningar

**26/22**
**22/00096-1 Skattatøl 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 5/22 |
| 6 Býráðið | 05.05.2022 | 11/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 6/22 |
| 8 Býráðið | 31.05.2022 | 21/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 9/22 |
| 10 Býráðið | 30.06.2022 | 26/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**27/22**

**22/00268-3 Barnaváttanir -kunning um lógina, ið kom í gildið 1. juni 2022 og mannagongdir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 10/22 |
| 2 Býráðið | 30.06.2022 | 27/22 |

**Málslýsing:**

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

# 28/22 LUKKA MÁL
# 22/00204-1

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

Fundurin lokin kl. 18:15

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Jónhild Midjord Nybo

Mina Joensen

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen